Vælkomin til dyst í Fløtugerði

# ÍF – B36

leygardagur 3. oktober 2015




Minst til limagjaldið!
Sí http://www.if.fo

Mynd: Álvur Haraldsen

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
*ábyrgdarblaðstjóri*

## Vælkomin til Effodyst í Fløtugerði í Fuglafirði

Í dag taka vit ímóti B36 úr Havn, sum longu hava tryggja sær meistaraheitið, annað árið á rað, sum er fyrstu ferð hjá teimum. Vit vilja ynskja B36 hjartaliga tillukku við meistaraheitinum.

Um vit skulu tryggja okkum framgongd á stigatalvuni í mun til í fjør, tá vit endaðu nr 7, krevst allarhelst ein sigur í dag, tí liðini aftanfyri okkum AB og TB kunna jú fara framum okkum um tey vinna í dag. Í sama viðfangi kunnu vit so ásanna, at kravið til okkara lið er hækka í mun til fyri nøkrum árum síðan, tá vit høvdu leiklutin sum elevatorlið, so hóast ikki øll eru so væl nøgd, so er ein uggi at hendan leiklut hava vit skift út, við ein meira støðufastan leiklut.

Um vit skulu taka samanum hetta kappingarárið, so er ongin ivi um at tað ikki hevur gingið eftir vild hjá okkum, vit hava ikki rættuliga fingið eins væl burturúr, sum vit høvdu vóna og vænta.



Vit hava spælt alt ov nógvar javnleikir, men sum oftast tí at vit hava hála teir í land í evstu løtu, har vit hava lora ov nógv í byrjani av dystunum. Eyðkenni fyri árið er eisini at vit hava næstan ongan dyst spælt væl í 90 min, men hava spælt sera misjavnar hálvleikir, hví hetta er so, er ringt at meta um. Kappingin byrjaði 1.mars, so tíðliga er hon ikki byrja áður, tað vísti seg at tey flestu liðini ikki vóru heilt klár, tí at allarflestu dystirnir í fyrstu umførunum endaðu javnir. Veðrið hevði eisini sítt at skula havt sagt, við at færri venjingardystir enn ætla vórðu leiktir, ella at fleiri vórðu leiktir ódarvaðir.

Vit fingu ein avsmurning frá FC Suðuroy vesturi á Eiðinum í Vági seinasta vikuskifti, og eiga okkara menn at vera altráðir eftir at vaska hetta tapið av sær, B36 ætlar sær at enda við manér, so lagt er upp til ein undirhaldandi dyst, har bæði liðini fara at leggja nógv fyri, fyri at seta punktum fyri kappingarárið 2015.

*Koyrið á dreingir.*
*Góðan dyst øll somul*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fyrr í á gekk tað soleiðis: | | | |
| 7 | 19-04-2015 | ÍF-B36 | 3-1 |
| 18 | 28-07-2015 | B36-ÍF | 4-0 |
| Í 2014 gekk tað soleiðis: | | | |
| 6 | 21-04-2014 | ÍF-B36 | 2-5 |
| 15 | 27-06-2014 | B36-ÍF | 1-0 |
| 24 | 01-10-2014 | ÍF-B36 | 1-2 |
| Í 2013 soleiðis: | | | |
| 8 | 28-04-2013 | B36-ÍF | 2-2 |
| 17 | 28-07-2013 | B36-ÍF | 1-2 |
| 27 | 26-10-2013 | ÍF-B36 | 1-3 |
| Í 2012 gekk tað soleiðis: | | | |
| 3 | 05-04-2012 | B36-ÍF | 1-1 |
| 10 | 28-05-2012 | ÍF-B36 | 1-1 |
| 20 | 19-08-2012 | B36-ÍF | 0-2 |


**ÍF FÓTBÓLTUR**
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

**LEIKSKRÁIN:**
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: NiNG - Tel 215 315





HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
*ábyrgdarblaðstjóri*



### Vælkomin til Effodyst í Fløtugerði í Fuglafirði

Í dag taka vit ímóti B36 úr Havn, sum longu hava tryggja sær meistaraheitið, annað árið á rað, sum er fyrstu ferð hjá teimum. Vit vilja ynskja B36 hjartaliga tillukku við meistaraheitinum.

Um vit skulu tryggja okkum framgongd á stigatalvuni í mun til í fjør, tá vit endaðu nr 7, krevst allarhelst ein sigur í dag, tí liðini aftanfyri okkum AB og TB kunna jú fara framum okkum um tey vinna í dag. Í sama viðfangi kunnu vit so ásanna, at kravið til okkara lið er hækka í mun til fyri nøkrum árum síðan, tá vit høvdu leiklutin sum elevatorlið, so hóast ikki øll eru so væl nøgd, so er ein uggi at hendan leiklut hava vit skift út, við ein meira støðufastan leiklut.

Um vit skulu taka samanum hetta kappingarárið, so er ongin ivi um at tað ikki hevur gingið eftir vild hjá okkum, vit hava ikki rættuliga fingið eins væl burturúr, sum vit høvdu vóna og vænta.

Vit hava spælt alt ov nógvar javnleikir, men sum oftast tí at vit hava hála teir í land í evstu løtu, har vit hava lora ov nógv í byrjani av dystunum. Eyðkenni fyri árið er eisini at vit hava næstan ongan dyst spælt væl í 90 min, men hava spælt sera misjavnar hálvleikir, hví hetta er so, er ringt at meta um. Kappingin byrjaði 1.mars, so tíðliga er hon ikki byrja áður, tað vísti seg at tey flestu liðini ikki vóru heilt klár, tí at allarflestu dystirnir í fyrstu umførunum endaðu javnir. Veðrið hevði eisini sítt at skula havt sagt, við at færri venjingardystir enn ætla vórðu leiktir, ella at fleiri vórðu leiktir ódarvaðir.

Vit fingu ein avsmurning frá FC Suðuroy vesturi á Eiðinum í Vági seinasta vikuskifti, og eiga okkara menn at vera altráðir eftir at vaska hetta tapið av sær, B36 ætlar sær at enda við manér, so lagt er upp til ein undirhaldandi dyst, har bæði liðini fara at leggja nógv fyri, fyri at seta punktum fyri kappingarárið 2015.

*Koyrið á dreingir.*
*Góðan dyst øll somul*

Fyrr í á gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 19-04-2015 | ÍF-B36 | 3-1 |
| 18 | 28-07-2015 | B36-ÍF | 4-0 |

Í 2014 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6 | 21-04-2014 | ÍF-B36 | 2-5 |
| 15 | 27-06-2014 | B36-ÍF | 1-0 |
| 24 | 01-10-2014 | ÍF-B36 | 1-2 |

Í 2013 soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 8 | 28-04-2013 | B36-ÍF | 2-2 |
| 17 | 28-07-2013 | B36-ÍF | 1-2 |
| 27 | 26-10-2013 | ÍF-B36 | 1-3 |

Í 2012 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3 | 05-04-2012 | B36-ÍF | 1-1 |
| 10 | 28-05-2012 | ÍF-B36 | 1-1 |
| 20 | 19-08-2012 | B36-ÍF | 0-2 |

**ÍF FÓTBÓLTUR**
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

**LEIKSKRÁIN:**
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: NiNG - Tel 215 315



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# 2. deild kvinnur vunnu bronsu í ár

# TILLUKKU VIÐ TÍ



*Standandi f.v: Hanna (venjari), Sigrun, Erla, Mary Ann, Kristina, Jóhanna, Elsbet og Maria Húkandi f.v: Noomi, Mirjam, Jenny, Bjørg, Inga Maria og Elin. (Hanna E. Olsen eigur myndina)*



Fuglafjarðar Keypssamtøka

tel 660020
fax 444895 | far 217095

Opið er mánadag - leygardag frá kl. 9 - 22
Sunnudag er stongt!

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

**SPEKT** | løggildir grannskoðarar



Linde Gas ] **AGA**

# FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

**Opnigstíðir:**
Mána. - Fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**









## Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**

# TIPS 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Fimm teir fyrstu spurningarnir eru um viðkomandi leikara, ið verður spurdur, í meðan teir írestandi átta, eru vanligir fótbótlsspurningar. Í teimum fyrstu 5 spurningunum fær leikarin hálvt minusstig, um hann ikki hevur rætt svar. Annars telur rætt svar 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum og skal taparin, so senda víðari til næsta mann/kvinnu í røðini.

Eftir at Sjúrður vann á Eyðun síðst, so endaði fakkilin hjá Jens Christian Djurhuus. Jens Christian gav ikki ta nógvu mótstøðuna, og vann Sjúrður heili 7-4, hóast hann hevði 2 spurningar um seg sjálvan skeivar. Sjúrður megnaði sostatt at pynta uppá úrslitið, so endaliga støðan gjørdist 7-6 til fjepparanar í ár - tillukku við tí. Stóri málslúkurin fyri fjepparanar má sigast at verða venjarin hjá 3. deild, Martin M. Hansen, sum við sínum 4 stigum, stóð fyri meir enn helminginum av tí - sera flott.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | SJ | EyR |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hvønn bleiv Sjúrður útskiftur fyri í sínum fyrsta dysti fyri ÍF? | André Olsen | Dánjal Paula Højgaard | John D. G. Guðjónsson | 1 | 0 |
| 2 | Hvør gav Sjúrður sítt fyrsta gula kort fyri ÍF? | Alex Troleis | Petur Reinert | Lars Muller | -0.5 | 0 |
| 3 | Hvussu nógvar heilar dystir hevur sjúrður spælt fyri ÍF í effodeildini? | 1 | 2 | 3 | 1 | 1 |
| 4 | Áðrenn dystin móti KÍ, hvussu ofta hevur Sjúrður umboðað ÍF | 17 | 18 | 19 | -0.5 | 1 |
| 5 | Hvønn bleiv Sjúrður útskiftur fyri í 3-3 dystinum móti Víkingi í steypakappingini? | Kristoffur Jakobsen | Nenad Saric | Frank Poulsen | 1 | 0 |
| 6 | Hvør spælir við blusu nummar 10 hjá West Ham? | Mauro Zarate | Enner Valencia | Alex Song | 1 | 0 |
| 7 | Hvør leikari hevur leikt flest landsdystir fyri Danmark? | Dennis Rommedahl | Peter Schmeichel | Jon Dahl Tomasson | 0 | 0 |
| 8 | Hvussu nógvar dystir hevur Árni Petersen spælt fyri besta liðið hjá ÍF? | 29 | 49 | 69 | 0 | 0 |
| 9 | Hvør venjari hjá Arsenal keypti Dennis Bergkamp | Bruce Rioch | Arséne Wenger | George Graham | 0 | 1 |
| 10 | "Um hvønn leikara varð sungið ""he's so good, they named him twice""?" | Eric Djemba-Djemba | Jay-Jay Okocha | Paolo Di Canio | 1 | 0 |
| 11 | Hvør er venjari hjá íslendska fótbóltslandsliðnum | Eric Hamrén | Henrik Larsson | Lars Lagerback | 1 | 1 |
| 12 | Hvør er toppskjútti í EM undankappingini | Robert Lewan-dowski | Kyle Lafferty | Arkadiusz Milik | 1 | 0 |
| 13 | Fyri hvatt fyrrverandi Premier League felag spælir Joey Barton við nú? | Blackburn Rovers | Blackpool | Burnley | 1 | 0 |
| | Tilsamans | | | | 7 | 4 |

*Rætt svar: 1 - 2 - x - 2 - x - 1 - x - 2 - 1 - x - 2 - 1 - 2*







KJ HYDRAULIK veitir
- Tvíkiljur
- Alíringar
- Alíbesløg
- Iveco motorar
- Palfinger sjókranar
- Kapstanar og spøl
- og mang annað

Vit hava á goymslu:

Vit eru sølu- og tænastuumboð fyri:

# Fjølbroyttur veitari til vinnuna

KJ HYDRAULIK er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastu til alivinnuna, skipaflotan, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.

Set teg í samband við okkum í Havn ella á Kambsdali, **ring 40 70 00**

KJ HYDRAULIK POWER & MOTION CONTROL

**Kambsdalur:** Postsmoga 110 / **Tórshavn:** Mykinesgøta 5 · Tel 40 70 00 · Faks 40 70 01 · info@kj.fo · www.kj.fo







Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179



Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið

SVENDKROSSTEIN

Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo

SENDISTOVAN

# Leikarar í báðum legum

**Í dag taka vit í móti føroyameistarunum úr B36. Hóast tað feløgini ikki liggja nær við hvørt annað, og tað er ein tími at koyra í millum Fuglafjørð og Havnina, so eru tað fleiri leikarar, ið hava roynt seg í báðum feløgunum**

Av teimum, sum hava møguleika at fara á vøllin í dag, eru tað Adeshina Lawal, Tórður Thomsen og Hanus Thorleifsson.

Hyggja vit eftir leikarum, sum hava fingið sína fótbóltsuppaling í Fuglafirði, so eru fleiri, ið kunnu nevnast, og hava vit valt at hugt nærri at nøkrum teirra.

Rógvi Róin (fyrr Larsen): Rógvi hevur einans umboðað 2 feløg. Hann spældi við ÍF frá 1991-1997, áðrenn hann skifti til B36 í 1998 og ein part av 1999, tá hann kom aftur til ÍF. Kappingarárið 2000 spældi hann aftur í hvíta búnanum, ímeðan fyrra hálva í 2001 var spæld í Havn og seinna hálva í Fuglafirði. Fór síðan aftur til Havnar at spæla í 2002, og kom heimaftur til Fløtugerði í 2003. 2004-2015 vóru spæld í Gundadali. Kappingarárini 2006, 2007, 2008 og 2010 er hann tó ikki skrásettur fyri nakran dyst. Rógvi er skrásettur fyri 268 dystir, 25 mál, 4 gul kort og 1 reytt kort. Hetta er komið í fremstu, næstfremstu og triðfremstu deildini, dystum um upp- og niðurflyting, steypakapping, Champions League og UEFA Cup undankappingardystum. ÍF fjepparar minnast óivað best málið, sum Rógvi skeyt móti KÍ á Norðoyastevnu 1997, tá vit vunnu 1-0.



*Mynd: Ólavur Larsen*

Atli Petersen: Eins og við Rógva, so hevur Atli einans umboðað 2 feløg. Yrkisleiðin hjá Atla var frá 2001-2013, og umboðaði hann B36 seinnu hálvu í 2009, har tað bleiv til 2 dystir í fremstu deildini. Tilsamans hevur hann spælt 180 dystir skotið 51 mál, fingið 15 gul kort og einki reytt. ÍF fjeppara minnast kanska serliga væl tvey av málunum hjá honum, sum bæði eru ímóti B36. Annað var eitt satt brak av einum langskotið í Fløtugerði, har okkara núverandi venjari stóð sum kánus, og einki fekk gjørt, ímeðan hitt var í Gundadali – eisini móti B36 og Jákupi – har hann vendir sær á einum frímerki inni í 16-metrinum og í besta Hasselbaink stíli smekkar bóltin í kassan.

Magni á Lakjuni: Magni er fyrsti av leikarunum, sum ikki einans umboðaði 2 feløg. Umframt ÍF og B36, so var hann eisini í HB og EB/Streymi. Magni spældi við okkum frá 1990-1994. Var so eitt kappingarár í B36, og vendi síðan aftur til ÍF í 1997. Frá 2000-2002 var hann so aftur í hvíta B36 búnanum, ímeðan barndómsfelagið fekk ágóðan av hansara evnum kappingarárini 2004 og 2005. Leikti síðan aftur við B36 í 2006 og frá 2010-2012 og 2014-2015. Magni er tilsamans skrásettur fyri 271 dystir, 89 mál, 9 gul kort og 2 reyð kort. Hesir statistikkir hevur hann samlað sær í fremstu, næstfremstu og triðfremstu deildini, upp- og niðurflytingar dysti, steypakappingini,

*Framhald á síðu 18*





## Salong Halda.fo

Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:

| | |
|---|---|
| Mánadag | 9.00 - 17.00 |
| Týsdag | 9.00 - 19.00 |
| Mikudag | 9.00 - 19.00 |
| Hósdag | 9.00 - 18.00 |
| Fríggjadag | 9.00 - 17.00 |
| Leygardag | 9.00 - 13.00 |

Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA

**Jens Kl. Jacobsen**
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo

**Henning Olsen**
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo

510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo

## Álvaskot

Fysioterapi
v/Álvur Hansen

44 51 44

## Krana- & lastvognskoyring

Maskinur & Amboð



v/ Poul Joensen
Tlf. 21 31 95

pouljo@olivant.fo

Svarar alt døgnið





BANKNORDIK

NordikPENSJÓN

**Alt, sum tín pensjón eigur at vera**

› www.banknordik.fo/pensjon




j+h BETONG
✆ 22 20 15

## SANDGREVSTUR

1949




Bakkavegur 32 • FO-530 Fuglafjørður • Faroe Islands
Phone +298 445000 or +298 595900 • www.sandship.fo




Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**





# VØRUHÚSIÐ

**TEL 54 25 00**




**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

*Framhald frá síðu 12*

Atlantic Cup og Champions League og UEFA Cup undankappingardystum. Fuglfirðingar minnast kanska best upp- og niðurflytingar dystin móti B71 í 2004, tá Magni skeyt 3 mál í seinna dystinum, sum varð spældur í Fuglafirði.

Ken Bærentsen: Her er talan um tann leikaran, sum hevur metið, um hugsað verður um flest kappingarár í hópinum á besta liðnum hjá okkum. Ken hevur einans umboðað 2 feløg, men var steðgurin í B36 einans fyrra hálva í kappingarárinum 1995. Hansara yrkisleið vardi frá 1987-2013, tó er hann ikki skrásettur fyri nakran dyst kappingarárini 1988 og 1997. Er skrásettur fyri 254 dystir, 90 mál, 16 gul kort og einki reytt kort. ÍF fjeppara minnast helst best frísparkmálið í móti KÍ í Klaksvík í 1999, tá vøllurin var mest líkur einum svimjihyli.

Fara vit so nøkur ár longur aftur, um hugsað verður um aldurin á leikarunum, ið hava havt sín fótbóltsuppvøkstur í Fløtugerði, eru tað serliga tveir leikarar, ið koma til hugs.

Ábraham Løkin (fyrr Hansen): Ábraham er helst ikki ein maður, ið tørvar stórvegis presentatión í føroyska fótbóltsheiminum. Yrkisleiðin hjá honum vardi líka frá 1977-2003, og umboðaði hann, umframt ÍF og B36, NSÍ og B68. Hann spældi við okkum kappingarárini 1977-1980, 1985, 1989-1991, 1994 og seinnu hálvu 1999. Kappingarárini 1987 og 1988 leikti hann í hvíta og svarta B36 búnanum. Ábraham er skrásettur fyri tilsamans 215 dystir, 44 mál, 13 gul kort og 2 reyð kort. Av tí at greinaskrivarin ikki minnist "velmaktina" hjá Ábraham, so er ringt at siga, hvat man standa fremst í minninum hjá fótbóltsfjepparum í Fuglafirði. Fyri mítt viðkomandi er tað síðsta málið, ið Ábraham skeyt í fremstu deildini, sum stendur fremst í minninum. Málið kom í 3-3 javnleiki móti B71 í Fuglafirði í 1999. Til stuttleikar kann nevnast, at pápi Lukasz Cieslewicz, Robert, spældi saman við Ábraham fyri gott og væl 16 árum síðan.

Meinhardt Dalbúð: Eins og Ábraham, so byrjaði yrkisleiðin hjá Meinhardt í 1977, men gavst Meinhardt at spæla í 1996 - er tó skrásettur fyri ein dyst í 2007. Umframt ÍF og B36, so hevur Meinhardt spælt fyri Skála, LÍF og NSÍ. Spældi við ÍF frá 1977-1983, 1985, 1994 og 1996, ímeðan hann í 1987 og 1988 spældi fyri B36. Er skrásettur fyri 89 dystir, 16 mál og 5 gul kort. Felags fyri Meinhardt og Ábraham er, at teir báðir vóru á nógv umtalaða '79 liðnum, báðir hava drúgvar royndir sum venjarar og at tað eru fáir dystir, sum fremsta liðið hjá okkum spælir, har teir báðir ikki eru ímillum áskoðararnar.

Omanfyri eru nevndir leikarar, sum eru uppaldir í Fuglafirði. Fara vit so øvugta vegin, og hyggja at leikarum, ið byrjaðu í B36, so er tað serliga ein leikari, sum hugsað verður um.

Jan Guttesen: Yrkisleiðin hjá Jan byrjaði í 1993, og er eftir øllum at døma ikki liðug enn. Hann hevur spælt við FC Hoyvík afturat okkum og B36. Spældi við B36 frá 1993-2002, 2010-2011 og 2014-2015, ímeðan hann í 2004-2006 spældi við ÍF. Er skrásettur fyri 240 dystir, 14 mál, 33 gul kort og 1 reytt kort.

Av útlendskum leikarum, sum hava umboðað bæði feløgini eru tað serliga tvey nøvn, sum flest øll minnast.

Maciej Maryniak: Póllendingurin hevur einans spælt 2 kappingarár í Føroyum. Í 1998 spældi hann 24 dystir fyri ÍF, skeyt 11 mál og fekk 4 gul kort. Tvey ár seinni var hann í B36, har hann frá 5. august til 27. august spældi 6 dystir, skeyt 2 mál, men einki kort fekk.

Sylla Amed Davy: Leikarin úr Fílabeinsstrondini spældi 4 kappingarár í Føroyum - tvey í Fuglafirði og tvey í Havn. Árini 2004 og 2005 spældi hann 41 dystir, skeyt 11 mál og fekk 3 gul kort fyri ÍF. Tvey tey næstu árini spældi hann 65 dystir, skeyt 36 mál og fekk 6 gul kort fyri B36. Í 2007 vóru hansara 18 mál nóg mikið til at gera hann til toppskjútta í fremstu deildini.

Rúni Elttør og Jákup Mikkelsen hava umboðað feløgini, men eru ikki við her, av tí teir vóru við í síðstu leikskrá.

*Kelda: faroesoccer.com*






















ASKUR eitur nýggja limaskipanin hjá ÍSF, sum alt fleiri feløg nú brúka. ÍF hevur nú knýtt seg upp í skipanina, og hetta merkir, at allir limir skulu gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap umvegis nýggju skipanina á hesi síðuni.

Nýggja skipanin hjá ÍSF hevur til endamáls at skráseta øll ítróttafólk í Føroyum, og tá spælarar í ÍF gjalda limagjaldið og/ella skráseta limaskapin her, eru teir samstundis skrásettir sum íðkandi undir ÍSF – og sjálvandi eisini sum limir í ÍF.

Við nýggju skipanini verður ikki longur møguligt at gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap við vanligari flyting umvegis bankan. Nógv umsiting hevur verið av tí, og nú øll gjøld fara um nýggju skipanina, lættir tað munandi um hjá felagnum umsitingarliga.

Vónandi lættir nýggja skipanin eisini um hjá foreldrum og spælarum, sum skjótt og lætt kunnu gjalda limagjøldini og skráseta limaskapirnar her. Felagið heitir á øll um at gjalda limagjald og skráseta limaskap nú! Tá limagjaldið er goldið, og limaskapurin skrásettur, er spælarin eisini limur í tryggingarskipanini hjá ÍSF.

Sí meira á www.if.fo

# HAGTØL

FAROE SHIP

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 10/3/15 | TB-Víkingur |
| 10/3/15 | AB-NSÍ |
| 10/3/15 | HB-FC Suðuroy |
| 10/3/15 | KÍ-EB/Streymur |
| **10/3/15** | **ÍF-B36** |

## TOP 5 FLEST DYSTIR FYRI OKKUM Í ÁR

| Navn | Dystir | Min. | Mál | Uppl. | G-kort | R-kort |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Poul N. Mikkelsen | 24 | 2160 | 0 | 1 | 3 | 0 |
| Nenad Saric | 24 | 1752 | 2 | 1 | 1 | 0 |
| Clayton Soares | 23 | 1912 | 6 | 4 | 1 | 0 |
| Leivur Joensen | 22 | 1662 | 3 | 3 | 2 | 0 |
| Andy Ó. Olsen | 22 | 1501 | 7 | 5 | 2 | 0 |

*Karl A. Løkin, Predrag Markovic og Ari Ó. Ellingsgaard hava spælt fleiri minuttir, men dystartalið er lægri hjá teimum. Keldur: faroesoccer.com og Jákup Ósa, Norðlýsið*

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Nr | Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|---|
| | Klæmint A. Olsen | 21 | NSÍ |
| | Finnur Justinussen | 15 | Vík |
| | Andreas Lava Olsen | 12 | Vík |
| | Pól Jóhannus Justinussen | 12 | NSÍ |
| | Jón Krosslá Poulsen | 11 | FC S |
| | Albert Adu | 10 | TB |
| | Lukasz Cieslewicz | 10 | B36 |
| | Heðin Klakstein | 10 | KÍ |
| | Hans Pauli Samuelsen | 9 | B36 |
| | Árni Frederiksberg | 9 | NSÍ |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | LK | SK | Tils. |
|---|---|---|---|
| Andy Ó. Olsen | 7 | 1 | 8 |
| Clayton Soares | 6 | 1 | 7 |
| Adeshina A. Lawal | 7 | | 7 |
| Kristoffur Jakobsen | 2 | 2 | 4 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 3 | 1 | 4 |
| Bartal Eliasen | 3 | 1 | 4 |
| Dánjal á Lakjuni | 3 | 1 | 4 |
| Nenad Saric | 2 | 1 | 3 |
| Leivur Joensen | 3 | | 3 |
| Karl A. Løkin | 2 | | 2 |
| Jan Ó. Ellingsgaard | 2 | | 2 |
| Áki Petersen | 1 | | 1 |
| Fritleif í Lambanum | 1 | | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 26 | 17 | 7 | 2 | 57 | 24 | 33 | 58 |
| 2 | NSÍ | 26 | 15 | 6 | 5 | 72 | 37 | 35 | 51 |
| 3 | Víkingur | 26 | 14 | 8 | 4 | 66 | 35 | 31 | 50 |
| 4 | HB | 26 | 10 | 10 | 6 | 41 | 31 | 10 | 40 |
| 5 | KÍ | 26 | 10 | 8 | 8 | 44 | 40 | 4 | 38 |
| 6 | ÍF | 26 | 5 | 12 | 9 | 43 | 53 | -10 | 27 |
| 7 | TB | 26 | 4 | 14 | 8 | 36 | 45 | -9 | 26 |
| 8 | AB | 26 | 4 | 12 | 10 | 34 | 41 | -7 | 24 |
| 9 | FC Suðuroy | 26 | 6 | 4 | 16 | 39 | 66 | -27 | 22 |
| 10 | EB Streymur | 26 | 2 | 5 | 19 | 26 | 86 | -60 | 11 |



JOHN's
KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR
LIVANDI TÓNLEIKUR
HVØRT VIKUSKIFTI
ALTÍÐ PUBQUIZ
LEYGARKVØLD KL. 22
OG VIT VÍSA SJÁLVANDI
DYSTIRNAR!
OPIÐ: FRÍGGJADAG 19—04 — LEYGARDAG 17—04 — SUNNUDAG 17—23
FYLG VIÐ Á FACEBOOK / JOHN'S Í FUGLAFIRÐI

Liðini í dag:

# ÍF – B36

| | |
|---|---|
| 1 | Hallgrím G. Hansen (M) |
| 2 | Áki Petersen |
| 3 | Poul N. Mikkelsen |
| 4 | Sjúrður Jacobsen |
| 5 | Fritleif í Lambanum (L) |
| 6 | Margeir Toftegaard |
| 7 | Dánjal á Lakjuni |
| 8 | Bogi Reinert-Petersen |
| 9 | Kristoffur Jakobsen |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard |
| 11 | Frank H. Poulsen |
| 15 | Jákup Oluf á Lakjuni |
| 16 | Karl A. Løkin |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento |
| 19 | Levi Jøkladal |
| 20 | Leivur Joensen |
| 21 | Andrias Poulsen |
| 22 | Nenad Saric |
| 23 | Andy Ó. Olsen |
| 24 | Dánjal Pauli Højgaard |
| 25 | John Daniel Guðjónsson |
| 28 | Arnold Kristiansen |
| 30 | Adeshina A. Lawal |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard |
| 76 | Bartal Eliasen |
| - | Tóri T. Traðará (M) |
| - | Fríði Sigurðsson (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Jákup Mikkelsen |
| Hjálparvenjari: | Ólavur Larsen |
| Hjálparvenjari: | Eyðun Ryggshamar |
| Liðleiðaraábyrgd: | Dan Petersen |

| | |
|---|---|
| 1 | Tórður Thomsen (M) |
| 2 | Andrias H. Eriksen |
| 3 | Jónas þór Næs |
| 5 | Odmar Færø |
| 6 | Eli Falkvard Nielsen |
| 7 | Hans Pauli Samuelsen |
| 8 | Hørdur Askham |
| 9 | Jákup á Borg (L) |
| 10 | Róaldur Jakobsen |
| 11 | Lukasz Cieslewicz |
| 13 | Gestur B. Dam |
| 14 | Philip Lund |
| 17 | Alex Mellemgaard |
| 18 | Benjamin Heinesen |
| 19 | Árni G. Nielsen |
| 20 | Høgni Eysturoy |
| 24 | Hanus Thorleifsson |
| 25 | Trúgvi Askham (M) |
| 29 | Ibrahima Camara |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Eyðun Klakstein |
| Hjálparvenjari: | Jákup á Borg |
| Málmansvenjari: | Fróði Clementsen |
| Liðleiðari: | Jens Kristian Hansen |
| Liðleiðari: | Kári Johansen |
| Liðleiðari: | Johnny Samuelsen |
| Fysioterapeutur: | Beinta Laursen |

**Dómari:** Petur Reinert
**Hjálpardómarar:** Dan Højgaard og Edvard Højgaard
**4. dómari:** Johnleif Gerðisá
**Eygleiðari:** Niklas